Battarí- og akkumulatorfyritøkan Pólar:

# Góð tænasta er okkara vørumerki



*Tór-Egil Ørvarodd frá Pólar skiftir her til nýggjan Varta akkumulator*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Oddvald Ørvarodd, pápi Tór-Egil og Margeir Ørvarodd, var skræddari, og hetta skelti hekk á hansara skræddararavirki í Eiriksgøtu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Í einum av fyrrverandi bygningunum hjá Reyni Service í Rættará húsast í dag battarí- og akkumulatorfyritøkan Sp/f Pólar, sum havnarmaðurin Margeir Ørvarodd setti á stovn í 1994. Fyritøkan leggur stóran dent á kappingarførar prísir og góða tænastu**

FYRITØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í einum hugnaligum hølum niðri í Rættará heldur battarí- og akkumulatorfyritøkan Sp/f Pólar við Margeir Ørvarodd til. Fyritøkan hevur sermerkt seg við at hava øll sløg av battaríum og akkumulatorum á goymslu.

Margeir er 57 ára gamal, og havnarmaður, sonur Thomasiu Matras og Oddvald Ørvarodd, tann kenda skræddaran í Havn.

Margeir hevur annars siglt frá ungum døgum av, men eftir 25 ár á sjónum legðist hann upp á land í 1985. Hann hevði tá siglt við skipum sum Brandi Sigmundarsyni, Kúrberg og Ørnini.

Undir hørðu búskaparkreppuni fyrst í 90-unum stóð Margeir brádliga uttan arbeiði. Men eftir trimim arbeiðsleysum vikum gjørdi hann bart og yvirtók eina akkumulatorfyritøku.

Tveir av synum hansara keyptu um somu tíð tvey samanbygd hús í Rættará. Tað eina húsið verður leigað út sum íbúðir, meðan Sp/f Pólar fór inn í hitt húsið, har eykalutagoymslan hjá Reyni Service fyrr helt til.

Tann 7. oktober 1994 lat handilin upp, og umframt Margeir starvast eisini bróðir hansara, Tór-Egil M. Ørvarodd, dagliga í handlinum.

Fyri stuttari tíð síðani nýumvældu brøðurnir báðir handilshølini, so at tey í dag eru sera hugnalig og kundavinarlig. Teir selja akkumulatorar til bilar og bátar, og fáast hesir í ymsum støddum, eins væl og í prísum.



*Brøðurnir Tór-Egil og Margeir Ørvarodd inni í handlinum, Pólar, í Rættará*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vanligt er, at alt akkumulatorvirksemi er tengt at árstíðini. Og besta árstíðin at selja er júst nú, tá kavin og kuldin eru farin at gera um seg. Tí ein vánaligur akkumulator kann virka væl í lýggjum veðri, men starttrupulleikarnir koma, so skjótt sum veðrið gerst kaldari.

Hjá Sp/f Pólar leggja teir avbera stóran dent á at veita góða tænastu. Um ein bilur t.d. hevur starttrupulleikar, so kanna teir beinanvegin el-skipanina fyri at vita, um trupulleikin liggur í løðirelénum ella generatorinum, ella um talan er um ein vánaligan akkumulator.

Tað er vanliga Tór-Egil, sum kannar brekið og skiftir akkumulatorin. Og meðan kundin bíðar, verður hann boðin inn í hugnaligu kaffistovuna at bíða og práta við hini viðskiftafólkini ella Margeir sjálvan.

- Okkara vørumerki vil altíð vera góð tænasta, siga teir báðir, Margeir og Tór-Egil M. Ørvarodd frá Sp/f Pólar.



**Føroyar:** Føroya Kolvetni P/F · Bryggjubakki 22 · P.O. Box 1098 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel: +298 320 450 · Fax: +298 320 451

**Bretland:** Faroe Petroleum plc · 24 Carden Place · Aberdeen · AB10 1UQ
Tel: +44 1224 652 810 (switchboard) · Fax: +44 1224 643 243

e-mail: faroe-petroleum@faroe-petroleum.com · www.faroe-petroleum.com

Faroe Petroleum

*Men are generally incredulous, never really trusting new things unless they have tested them by experience.*

*Niccoloó Machiavelli (1513)*

Á góðum fakligum grundarlagi og við nýmótans vælumtóktum framferðarhættum kunnu vit menna, tillaga og gjøgnumføra skráir fyri okkara kundar innan effektiva leiðslu, við fokus á góðsku og kundatørv. Í samstarvi millum virkir ella persónar eru okkara royndir góð barlast.

Síðani vit byrjaðu okkara virksemi í 1997, hava vit m.a. loyst uppgávur innan hesi økir:

Menning av virkisleiðslu (stratetiskari leiðslu)
Búskaparligar greiningar
Góðskumenning (ISO, HACCP, HTU, v.fl.)
Rekruttering (setan av starvsfólkum fyri virkir)
Marknaðarføring (strategi og greiningar)
Ráðgeving fyri íverksetarar (virkisætlanir v.m.)
Uppgávur fyri almennar stovnar (samskipan v.m.)
Generel projektleiðsla av størri projektum

**Virkisráðgeving Ltd.**
Consulting Firm
Postboks 26 · FO-600 Saltangará · Føroyar
Tel. +298 449591 · Fax +298 449592 · Fartel. +298 219591
konsult@konsult.fo · www.konsult.fo

Lloyd's Register

Lloyd's Register er ein óheft "risk management" fyritøka, ið arbeiðir fyri at betra kvalitets-, trygdar-, umhvørvis- og handilsliga úrslitið hjá kundanum um allan heimin. Okkar arbeiðsumráði umfatar shipping, ídnað á landi og somuleiðis olju og gass

**Lloyd's Register Faroe Islands**
FO-490 Strendur
Faroe Islands
Tel +298 44 82 75
Fax +298 44 79 79
E-mail: ole.lauritsen@lr.org
Web: www.lr.org

Building better business

RÓK-EL
Góðk. El-innleggjari

- Allar El-innleggingar
- Nýgerð og umvæling
- El-Tænasta til skip

*Tosið altíð við okkum fyrst, tað loysir seg*

v/Jóhs. Olsen · FO-656 Saltnes
rok-el@post.olivant.fo
**tel 44 83 84 · fax 44 83 96**
**fartel 21 83 84 / 22 72 46**